FØROYATELE

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
uvmr@uvmr.fo

Fylgiskjal 7

Hoyvík, 4. februar 2024

Hoyringssvar frá Føroya Tele samtakinum til uppskot til broyting í fjarskiftislógini
Víst verður til mál nr. 23/19835, uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti, ið Føroya Tele fekk sendandi umvegis teldupost 11. januar 2024.

Viðmerkingar til broytingar í § 58 í fjarskiftislógini
Føroya Tele hevur hesar viðmerkingar til § 1 í broytingaruppskotinum, ið snýr seg um broyting av § 58, stk. 2 í núverandi fjarskiftislóg (Løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022), ið hevur verið galdandi síðani 1. januar 2016.

Í broytingaruppskotinum í mun til § 58, stk. 2 kann Fjarskiftiseftirlitið (”FSE”) m.a. *”...krevja allar upplýsingar, dátur o.a. útflýggjaðar, sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum ella fyri at gera av, um ávís viðurskifti eru partur av øki løgtingslógarinnar.”*

Í pkt. 1.3 í almennu viðmerkingunum er nevnt, at § 58, stk. 2 verður nágreinað soleiðis, at tað er FSE sjálvt, ið metir um hvørjar upplýsingar eru neyðugar fyri virksemið hjá FSE sambært lógini.

Sigast kann ikki annað enn, at FSE við hesum broytingaruppskoti fær óavmarkaðar heimildir, at krevja upplýsingar frá einum og hvørjum, herundir Føroya Tele.

Í pkt. 3.1 í serligu viðmerkingunum sæst, at við nýggju orðingini verður staðfest, at tað ikki fylgja eyka krøv til FSE til grundgeving fyri at krevja upplýsingar, enn tey sum fylgja av vanligu treytunum um, at upplýsingarnar skulu vera neyðugar fyri virksemið í samsvari við meginregluna um proportionalitet.

Hetta er tó ikki nógv vert fyri tann, sum kann verða spurdur eftir øllum upplýsingum, dátum v.m., tí tað verður FSE sjálvt, ið avgerð nær proportionalitetsreglan er hildin, og stendur FSE ikki til svars fyri nøkrum øðrum í sínum arbeiði.

Sambært almennu lógarviðmerkingunum til galdandi fjarskiftislóg er ES-teledirektivpakkin frá 2002, sum broyttur í 2009, høvuðsgrundarlagið undir føroysku fjarskiftislógini. Hesin er seinni blivin broyttur; meiri um tað niðanfyri. Talan er um fimm direktiv harímillum Directive 2002/21/EC (Framework Directive) á føroyskum, nevnt Rammudirektivið. Í mun til Rammudirektivið siga almennu lógarviðmerkingarnar m.a., at *”...Harafturat eru m.a. uppgávur og mannagongdir hjá eftirlitsmyndugleikunum skipaðar í Rammudirektivinum, umframt at reglur eru um málsviðgerð hjá somu myndugleikum.”*, jb s. 23f í lógaruppskotinum sum tøkt á logting.fo

Tað sæst hundraðtals ferðir í almennu og serligu viðmerkingunum til núgaldandi fjarskiftislóg, at hon í ógvuliga stóran mun byggir á ES rættin innan fjarskifti, sum hetta brot úr almennu viðmerkingunum er dømi um: *“… Grundarlagið undir hesum uppskotinum til føroyska*

Føroya Tele | Klingran 1-5 | Postrúm 27 | 110 Tórshavn | +298 30 30 30 | ft@ft.fo

fjarskiftislóg er soleiðis fjarskiftisreglurnar í ES, soleiðis sum hesar eru implementeraðar í londunum kring okkum. Tí er týðandi at skilja,hvat ES reglurnar snúgva seg um, og hvørjar meginreglur tær byggja á. Saman við tilsvarandi ásetingum í og forarbeiðnum til serstakliga donsku fjarskiftislógina, eru ES-direktivini tí eisini týðandi tulkingargrundarlag í ivaspurningum viðvíkjandi hesi lógini. …", jb. s. 23f í lógaruppskotinum, sum tøkt á logting.fo

Broytingaruppskotið viðvíkjandi § 58, stk. 2 gevur tó FSE í Føroyum væl víðari heimildir, enn tilsvarandi fjarskiftiseftirlit hava í øllum ES.

Í Directive 2002/21/EC (Rammudirektivið), Art. 5 sæst at fjarskiftiseftirlit í ES kunnu krevja tær upplýsingar teimum tørva, tó so at upplýsingarnar skulu vera 1) rímiligar í mun til tað sum verður kannað, umframt 2) at nationala fjarskiftiseftirlitið skal grundgeva fyri sínum fyrispurningi.

Í ES er tað sostatt galdandi eitt "nødvendighedskrav" og eitt "begrundelseskrav", tá eitt fjarskiftiseftirlit biður um útflýggjan av upplýsingum eftir § 58, stk. 2 ella meinlíkari áseting í ES limalondunum.

Kravið um *"nødvendighed"* er ein avgerandi rættartrygd, ið inniber at FSE ikki tilvildarligt kann krevja upplýsingar frá einum og hvørjum, herundir Føroya Tele. Kravið er við til at tryggja, at FSE ikki fæst við "fishing expeditions", har FSE uttan aktuellar ella objektivar ábendingar um lógarbrot e.l. fremur kanningar, sum fyri hin kannaða mangan kann verða tyngjandi.

Kravið um *"begrundelse"* viðførir, at FSE ikki biður um upplýsingar v.m., út yvir tað sum er neyðugt í mun til eftirlitið hjá FSE, men heldur í síni umbøn grundgevur fyri hví biðið verður um ávísar upplýsingar v.m.

Hetta eru treytirnar øll fjarskiftiseftirlit í ES arbeiða undir – og hetta er rættartrygdin, sum fjarskiftisfeløg v.fl. hava, har fjarskiftiseftirlit kring Europa hóast hetta hava víðar heimildir at arbeiða eftir.

Í pkt. 3 í serligu viðmerkingunum er sum grundgeving fyri broytingini av § 58, stk. 2 nevndur dómur í Føroya rætti frá 2019, har Føroya Tele fekk viðhald mótvegis FSE. Føroya Tele metir, at FSE yvirtulkar dómin og at hann ikki er so forðandi fyri virkseminum hjá FSE, sum FSE tulkar dómin at vera.

Nevndi dómur vísir bert til, at tá FSE biður um upplýsingar, so skal tað gerast í tráð við Art. 5 í Rammedirektivinum.

Føroya Tele vil loyva at avrit av dóminum verður latið Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, um FSE eisini tekur undir við hesum.

Omanfyrinevndu fimm ES direktiv, herundir Rammudirektivið, eru seinni blivin broytt til m.a. Directive 2018/1972, sum í Art. 20.1 sum í innihaldi hevur hevur somu áseting sum gamla lóggávan: *"Enhver anmodning om oplysninger skal stå i et rimeligt forhold til, hvad opgaven kræver og skal være begrundet."*

Tað er ikki vanligt í lóggávu, at geva eftirlitsmyndugleika óavmarkaðar heimildir í sambandi við tess eftirlit. Tá eingin myndugleiki er, ið hevur eftirlit við almennum eftirlitsstovni, so má

Føroya Tele | Klingran 1-5 | Postrúm 27 | 110 Tórshavn | +298 30 30 30 | ft@ft.fo

onkur bremsa vera í lóggávuni, ið tryggjar rættartrygdina hjá teimum sum koma undir møguligt eftirlit.

Sum dømi kann nevnast, at løgreglan í sínum kanningararbeiði skal fylgja rættargangslógini, sum hevur sera nógvar ásetingar, ið verja rættartrygdina hjá tí sum verður kannaður.

Samanumtikið, so vil Føroya Tele mæla frá, at § 58, stk. 2 í fjarskiftislógini verður broytt.

Føroyar hava valt at fylgja ES rættinum innan fjarskiftisøkið í sera stóran mun. Tað er ongin serlig orsøk til, at Føroyar nú skulu víðka reglurnar bert á hesum øki.

Viðmerkingar til uppskotið til nýggja § 58 a í fjarskiftislógini
Endamálið frá nettrygdarætlanini hjá landsstýrinum er at kortleggja samfelagstýðandi kt-undirstøðukervi, men metodan sum verður løgd upp til í hesum uppskoti, er ein innsavning av upplýsingum um alt fjarskiftis- og kt-undirstøðukervi, uttan atlit til hvat er samfelagstýðandi.

Høvuðsendmálið við hesi lógarbroyting er sambært pkt. 1.3 í Almennu viðmerkingunum: *"... at víðka um heimildirnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum til eisini at fevna um kortlegging í sambandi við nettrygd og til at gera portraskanningar á internetinum. ..."*

Endamálið við galdandi fjarskiftislóg er annars eitt heilt annað, nevniliga at tryggja kapping á fjarskiftismarknaðinum við at *"virka fyri einum vælskipaðum og nýskapandi marknaði fyri fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastur til frama fyri allar endabrúkarar."*, sí § 1.

Ætlanin at veita FSE nærum óavmarkaðar heimildir at innsavna upplýsingar um alt fjarskiftis- og kt-undirstøðukervi fer út um tað, sum verður lagt upp til á hesum stigi í nettrygdarætlanini.

Viðmerkingarnar greiða frá, at FSE bert skal gera kortlegging av samfelagstýðandi undirstøðukervinum, sum er fyrsta átakið í nettrygdarætlanini, men heimildirnar, sum verða givnar FSE í uppskotinum, eru væl víðari enn neyðugt at kunna kortleggja samfelagstýðandi undirstøðukervi.

Við hesum uppskoti verður ein einstakur geiri tikin burturúr, meðan ein myndugleiki fær tillutað víðar heimildir at føra eftirlit við veitarunum. Hetta uttan at ein ítøkiligur karmur er ásettur, sum veitararnir skulu fyrihalda seg til.

Tá ið FSE kann biðja um øll sløg av upplýsingum frá fjarskiftisveitarum og øðrum mest sum uttan avmarkingar, skapir hetta ein óneyðugan vanda fyri rættartrygdina og privatlívið hjá føroyingum, eins og tað er eitt óneyðuga stórt inntriv í ræðisrættin og virkisfrælsið hjá Føroya Tele og øðrum veitarum á føroyska marknaðinum. Heimildirnar, sum við lógaruppskotinum verða givnar FSE, minna á fleiri økjum um heimildirnar, sum eru givnar danska stovninum Center for Cybersikkerhed undir Forsvarets Efterretningstjeneste, men onki líknandi embætis- og lógarverk er bygt upp kring FSE, eins og tað er viðvíkjandi Center for Cybersikkerhed.

Kortleggingin av føroyska undirstøðukervinum kann eftir tykki Føroya Tele lættliga gerast, uttan at slíkar umfatandi heimildir verða givnar FSE.

Ásetingarnar um eina nýggja §58a eru eftir áskoðan Føroya Tele alt ov víðgongdar og hoyra annars ikki heima í fjarskiftislógini, men heldur í eini komandi lóg um nettrygd.

Føroya Tele | Klingran 1-5 | Postrúm 27 | 110 Tórshavn | +298 30 30 30 | ft@ft.fo

Viðmerkingar til § 58 a, stk. 2
Tá ið greinin nevnir, at "Upplýsingarnar, dáturnar o.a. kunnu vera av einum og hvørjum slagi", fevnir hetta fyri Føroya Tele um stórar nøgdir av møguliga viðkvomum persónsupplýsingum, herundir samrøðuupplýsingar, GPS-upplýsingar, ferðsluupplýsingar, vinnuloynidómar, starvsfólkaviðurskifti, umframt nýtsludátur um viðskiftafólk, sum løgreglan bert við dómara-úrskurði kann fáa atgongd til í sambandi við álvarsom revsimál.

At greinin er orðað á ein hátt, sum als ikki tekur atlit til, hvørji sløg av upplýsingum, biðið verður um at fáa útflýggjað, tykist at vera eitt óneyðuga ógvusligt inntriv í privatlívið og rættartrygdina hjá tí einstaka viðskiftafólkinum, í viðurskifti hjá starvsfólkum samtaksins umframt í virkisfrælsið og innanhýsis viðurskiftini hjá samtakinum sum heild.

Føroya Tele mælir til, at greinin verður orðað á ein slíkan hátt, at heimildin hjá FSE til at fáa upplýsingar útflýggjaðar, verður avmarkað til tað, sum er neyðugt, til tess at stovnurin kann útinna ítøkiliga myndugleika sín og uppgávur sínar, í hesum føri at fremja kortlegging av undirstøðukervinum.

Viðmerkingar til § 58 a, stk. 7
Tað, at broytingaruppskotið í eini undirgrein gevur FSE heimild til at gera portraskanning av interneti uttan nærri útgreining ella avmarking, tykist sum eitt lutfalsliga umfatandi inntriv, sum potentielt kann hava avleiðingar við sær fyri raksturin hjá tele- og KT-veitarum, rakstur og trygd í øðrum skipanum og privatlívið hjá tí einstaka.

Fjarskiftisfyritøkur eru vanar við, at ávís sløg av portraskanning støðugt fara fram, men tá ið lógargreinin verður orðað á ein so óavmarkaðan hátt, kann tað ikki útilokast, at skanningin kann elva til alarmar og møguliga niðurlæsingar og rakstrartrupulleikar í skipanum, og harvið tænastuslit fyri viðskiftafólk.

Somuleiðis kann skanningin hugsast at ávirka tænastustøðið hjá viðskiftafólkum, sum verða rakt av møguliga breiðu skanningini av internetinum. Hinvegin bendir umrøðan í viðmerkingunum til lógaruppskotið á, at ætlanin er at nýta portraskanning, sum ikki órógvar rakstur og trygd á føroyska internetinum.

Mælt verður til, at greinin nágreinar hóskandi treytir fyri portraskanning, herundir at passiv skanning skal nýtast, at einans fólk við skjalfestum førleikum skulu kunnu fremja portraskanningina, og – tá ið talan er um fjarskiftisveitarar – at FSE avtalar við veitaran frammanundan, hvussu portraskanningin skal fara fram, soleiðis at hetta í mestan mun minkar um vandan fyri rakstrarórógvi fyri veitara og viðskiftafólk.

Vegna Føroya Tele

William Joensen, virkandi samtaksstjóri

Føroya Tele | Klingran 1-5 | Postrúm 27 | 110 Tórshavn | +298 30 30 30 | ft@ft.fo